# BYGGISKRÁ

## Fortreytir



Oktober 2015

## Innihaldsyvirlit


1. Verkætlanin ... 3
1.1 Innleiðing ... 3
1.2 Byggiharri ... 3
1.3 Bygginevnd ... 4
1.4 Verkætlanarleiðari ... 4
1.5 Innanhýsis ráðgevi ... 4
1.6 Uttanhýsis ráðgevi ... 4
1.7 Brúkarar ... 4
1.8 Byggiøkið/grundøkið ... 5
1.9 Atkoma ... 6

2. Fortreytir ... 7
2.1 Fortreytir ... 7
2.2 Skipan av skúlanum ... 7
2.3 Frítíðarskúli ... 7
2.4 Forskúli ... 8
2.5 Arkitekturur ... 8
2.6 Listprýði ... 8
2.7 Orka ... 8
2.8 Alment virksemi ... 8
2.9 Útiøkir ... 8
2.10 Felagshøll ... 9
2.11 Ítróttarhøll ... 9
2.12 Svimjihøll ... 9
2.13 Flokshøli ... 9
2.14 Fakhøli ... 9
2.15 Starvsfólkafyrireiking og starvsfólkarúm ... 10
2.16 4-10 ... 10
2.17 Fótbóltsskúli ... 10
2.18 Matarumstøður ... 10
2.19 Barnatannrøkt ... 10
2.20 Stødd á skúlanum ... 10
2.21 Útbyggingarmøguleikar ... 11
2.22 Byggistig ... 11

3. Tíðarætlan ... 11
3.1 Tíðarætlan ... 11
3.2 Kostnaðarkarmur ... 11
3.3 Útbjóðing av byggiarbeiði ... 11

# 1. Verkætlanin

## 1.1 Innleiðing

Tórshavnar kommuna hevur samtykt at byggja nýggjan trísporaðan Vesturskúla í staðin fyri Tórshavnar Kommunuskúla og Venjingarskúlan, ið nú ber navnið Skúlin á Fløtum. Skúlin skal hava 3 spor frá 0.-7.flokk og 5 spor í 8. og 9. flokki. Tilsamans 850 næmingar. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í nýggja skúlanum.

Ein arbeiðsbólkur varð í 2012 settur at viðgera uppskotið um nýggjan skúla í vesturbýnum. Arbeiðsbólkurin kom við einari niðurstøðu í juni 2012. Bygginevndin, sum varð sett í mai 2014, var samd um, at uppskotið var eitt gott grundarlag at nýta til fyrireikingar til bygging av nýggjum skúla í vesturbýnum. Peningur var settur av til fyrireikingar og byggiskrá.

Skúlin verður bygdur í økinum ímillum Marknagilsvegin og Landavegin og verður granni hjá Marknagilsdeplinum.

Bygginevndin hevur valt at leggja arbeiðið soleiðis til rættis, at fyritreytirnar fyri byggingini verða lýstar í trim um pørtum:

**1 Byggiskrá Fortreytir**
**2 Byggiskrá Námsfrøðilig viðurskiftir**
**3 Byggiskrá Teknisk viðurskiftir**

Byggiskráin er ein samskipaður samandráttur av fyrireikingararbeiðinum, av fortreytum, ynskjum og krøvum.

**Fortreytir** lýsir verkætlanina yvirskipað, hvat viðvíkur bygnaði, stødd, kostnaði og tíðarætlan.

**Námsfrøðilig viðurskiftir** lýsir námsfrøðina, skipan av undirvísing og læring umframt lýsing av rúmum og lærugreinum. Í Námsfrøðilig viðurskiftir er hølisskrá og rúmtalva, sum lýsir stødd av rúmum, og hvussu tey eru skipað.

**Teknisk viðurskiftir** lýsir teknisku viðurskiftini, lendi, ferðslu, hitaskipan, konstruktións-, el-, HVS-, og ventilatiónsfortreytir.

## 1.2 Byggiharri

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32, Vaglið
110 Tórshavn
Telefon 302010 Telefax 302011
T-postur: torshavn@torshavn.fo

### 1.3 Bygginevnd

Sigurð Ó. Vang, formaður
Katrin Ellingsgaard, málsviðgeri
Helena Dam á Neystabø, býráðslimur
Bjørghild Djurhuus, býráðslimur
Jákup Dam, býráðslimur
Eyðna Justinussen, fíggjarleiðari
Mikael Viderø, tekniskur stjóri
Birita Wardum, býararkitektur

Høvuðsuppgávan hjá bygginevndini er at ráðgeva býráðnum og viðkomandi føstu nevndum og at hava ábyrgd av, at verkætlanin verður framd í samsvari við galdandi lóg, tey politisku krøvini/ynskini og innan teir givnu íløgukarmar, t.e. samtyktir, byggiskrá, skitsuuppskot, kostnaðarmeting og tíðarætlan.

Bygginevndin viðger og tekur avgerð um viðurskifti, ið vanliga verða bólkað sum óvæntað, og smærri tillagingar og viðurskifti, ið eru innan karmarnar av verkætlanini. Er ivi um, at talan er um viðurskifti, ið bygginevndin av sínum eintingum kann avgreiða, skal spurningurin verða lagdur fyri viðkomandi føstu nevnd. Er talan um eyka kostnað ella tíðarleinging, skal spurningurin altíð leggjast fyri føstu nevnd.

### 1.4 Verkætlanarleiðari

Eivind Danielsen, byggifrøðingur Tlf. 214037
T-postur: eivind@torshavn.fo

### 1.5 Innanhýsis ráðgevi

Birita Wardum, býararkitektur Tlf. 281109
T-postur: biritaw@torshavn.fo

### 1.6 Uttanhýsis ráðgevi

MAP Arkitektar – Rúni Abrahamsen Tlf. 551903
T-postur: ra@map.fo

### 1.7 Brúkarar

Í sambandi við tilgongdina at byggja Skúlan á Fløtum eru brúkararnir í skúlunum og Frítíðarskúlanum í Hornabø hoyrdir og hava, saman við umsitingini, skrivað eina niðurstøðu um nýggjan skúla í vesturbýnum. **Brúkarabólkarnir, sum eru hoyrdir, eru:**

- Træ- og jarnsmíð
- Myndlist
- Tænastudepil (bókasavn)
- Lestrarvegleiðing
- Handarbeiði
- Førleikastovan
- Heimkunnleiki
- Nát-vís-depil

- Ítróttur
- Miðdeild
- Uttandura/innandura fríøki
- KT
- Hádeild
- Málstova
- Tón/Drama
- Grunddeild/frítíðarskúli
- Húsavørðar og reingerð

Skúlarnir og frítíðarskúlin hava ein fylgibólk, sum kann samskifta við verkætlanarleiðsluna fyri at fáa tær bestu loysnirnar og ynskir við. **Fylgibólkurin er mannaður av:**

| | |
|---|---|
| Hanus Joensen | skúlastjóri |
| Jógvan Dahl | varaskúlastjóri |
| Ann Elisabeth Eldevig Joensen | frítíðarskúlaleiðari |
| Magnus Tausen | foreldraumboð |
| Sigrun Davidsen | námsfrøðingaumboð |
| Oddfríður Rasmussen | lærararaumboð |



*Luftmynd - Byggiøkið_kortal.fo*

## 1.8 Byggiøkið/grundøkið

| Matr. nr. | Vídd $m^2$ |
|---|---|
| 1099 | 14.660 |
| 1100 | 15.280 |
| 1102c | 5.819 |
| 1104d | 6.576 |

Tilsamans...................... 42.335 $m^2$
Harav vegur 3.600$m^2$

Serstøk byggisamtykt fyri Marknagil, góðkend av Innlendismálaráðnum 15.11.2011, ásetir, at byggistigið ikki má fara upp um 0,25, og nettonýtslustigið ikki má fara upp um 0,30.

Tað vil merkja, at bygningurin/-arnir kunnu í mesta lagi verða 9.684 $m^2$ við tilsamans 11.620 innrættaðum $m^2$.



*Yvirlitsplanur - Vegskipan_HMP*

## 1.9 Atkoma

Høvuðsinnkoyringin verður frá Landavegnum. Nýggjur vegur, Hans Andriasar vegur, verður lagdur norðanfyri dagstovnin við Landavegin. Sí kortið omanfyri. Tekniska deild hjá Tórshavnar kommunu stendur fyri at gera atkomuvegir á økinum, og er kostnaðurin sostatt ikki íroknaður verkætlanina.

## 2. Fortreytir

### 2.1 Fortreytir

Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011.

Løgtingslóg nr. 67 frá 10. Mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 38 frá 9 mai 2006.

Við støði í samrøðum við brúkarabólkar og skúlavitjanum, bæði í Føroyum og Danmark, sum bygginevnd og brúkarar hava gjørt, eru hølisstøddir og hølistørvur ásett. Skúlarnir, sum eru vitjaðir:

Skúlin við Ósánna
Skúlin á Argjahamri
Skúlin við Løgmannabreyt
Skúlin við Løkin
Skúlin á Giljanesi
Vibeengskolen
Skolen på Islandsbrygge
Bagsværd skole
Tinglev skole
Lyreskov skole
Christiansfeld skole
Tjørring skole
Nordstjerneskolen
Lisbjerg skole
Nynaturfaghuset

### 2.2 Skipan av skúlanum

Skúlin skal skipast í trimum pørtum eins og fólkaskúlalógin ásetur. Ein grunddeild, har flokkarnir 0.-3. flokkur húsast saman við frítíðarskúlanum, miðdeild, har 4.-6. flokkar húsast, og hádeild, har 7.-9. flokkur húsast.

### 2.3 Frítíðarskúli

Frítíðarskúlin er partur av skúlaætlanini. Frítíðarskúlin skal byggjast inn í grunddeildina. Frítíðarskúlin og skúlin skulu skipast í eina eind, har bæði skúli og frítíðarskúli kunnu gagnnýta hentleikarnar, sum eru í grunddeildini og í skúlanum annars. Skúli og frítíðarskúli eru felags um grunddeildina.

Í grunddeildini eru verkstaðir til frítíðarskúlavirksemi, men sum eisini kunnu brúkast til skúlavirksemi.

Karmarnir í verandi frítíðarskúla "Spíranum í Havnadali" verða framhaldandi partur av Skúlanum á Fløtum, og kann frítíðarskúlin sostatt nýta Spíran í framtíðini.

Dentur verður lagdur á at samskipa virksemið hjá frítíðarskúla og skúla í tilgongdini.

### 2.4 Forskúli

Forskúli er í nýggja Skúlanum á Fløtum og er partur av grunddeildini.

### 2.5 Arkitekturur

Karmarnir fyri skúlan skulu eisini vera nýskapandi og framskygdir, soleiðis at arkitekturin og námsfrøðin ganga upp í hægri eind. Broytingar, sum fara fram í samfelagnum, koma at seta stór krøv til skúlan og til nýtslu skúlans yvirhøvur. Samanumtikið eigur skúlabygningurin at vera gyrðin og liðiligur, til fleirtáttað brúk, broytta nýtslu, innrætting og til framtíðar tørv.

Skúlin hevur náttúruvísindi, tónleik, handverk og list á breddanum, og skal hetta síggjast aftur í byggilistini.

Tað skal leggjast áherðsla á, at við karmar skulu útiøkini eisini skiljast sum sjálvsagdur partur av byggilistini og námsfrøðini. Útiøkini skulu eggja til rørslu, uttandura tilhald og tað at læra. Veðurlagið gevur avbjóðingar, men eisini møguleikar, sum skulu gagnnýtast.

Skúlin skal vera eitt prýði og stoltleiki fyri býin.

### 2.6 Listprýði

Tað skal avsetast ein ávís upphædd til listprýði, sum er samsvarandi galdandi reglugerð hjá Tórshavnar kommunu. Upphæddin til listprýðið svarar til 1,5% av byggikostnaðinum. Listprýðið skal taka støði í læring og hugtakinum "sjónlig læring", sum eisini gongur hond í hond við byggilistina.

### 2.7 Orka

Byggingin skal lúka ásetingarnar, sum nýggja byggireglugerðin FBR2015 ásetur, um hendan er komin í gildi, tá byggingin skal projekterast, annars BR10.

### 2.8 Alment virksemi

Skúlin skal eisini vera virkin uttan fyri vanliga skúlatíð. Alt virksemi, sum hevur við at læra og mentan at gera, skal kunna húsast í skúlanum. Næmingar skulu eisini hava møguleika at brúka skúlan aftan á skúlatíð. Tað er upplagt, at frítíðarundirvísing fær innivist í skúlanum. Felagsskapir kunnu brúka skúlan til skeið, fundir og framførslur.

### 2.9 Útiøkir

Útiøkini skulu vera lagað til ymsu aldursbólkarnar í skúlanum. Uttanduraøkini skulu vera fjølbroytt og skulu eggja til uttandura uppihald og stimbra hugin hjá næmingum at røra seg. Uttanduraøkini skulu eisini stimbra og eggja til spæl og læring. Útiøkið eigur at vera góður karmur um spæl, rørslu og uttandura lærurúm.

## 2.10 Felagshøll

Allur skúlin skal kunna savnast í felagsøkinum til morgunsang, framførslur. og onnur tiltøk. Felagshøllin er ein av miðdeplunum í skúlanum. Felagshøllin nýtist ikki at vera sjálvstøðugt rúm, men kann vera partur av gongsøkjum og øðrum felagsøkjum. Tað er umráðandi, at tað uttan hóvasták ber til at fyriskipa tiltøk fyri allan skúlan. Partur av felagshøllini skal virka sum matarsalur fyri skúlan.

## 2.11 Ítróttarhøll

Ítróttarhøllin skal vera til støddar sum ein vanlig ítróttarhøll, sum kann býtast upp í fleiri hallir. Pláss skal vera fyri 400 áskoðaraplássum.

Hóast høllin fyrst og fremst er partur av skúlans virksemi til ítrótt, frítíðarskúla, próvtøkur og felags tiltøk, skal høllin eisini kunna nýtast av almenninginum uttan fyri skúlatíð, tá høllin er partur av ítróttarvirkseminum í Tórshavnar kommunu.

Tað skulu vera pláss fyri 1149 fólkum í høllini í senn.

## 2.12 Svimjihøll

Svimjihøll er ikki partur av verkætlanini.

## 2.13 Flokshøli

Flokkarnir hava egna flokssstovu. Flokshølið er, har næmingarnir hava sín heimstað í gerandisdegnum. Úr flokshølinum sprettur tað dagliga skúlavirksemið. Hjá teimum yngstu flokkunum er mesta virksemið í flokshølinum. So hvørt sum næmingarnir gerast meira sjálvstøðugir, flytist virksemið út í nærumhvørvið ella í fakhølini.

## 2.14 Fakhøli

Skúlin verður skipaður í 3 deplar.

**Náttúruvísindadepil – Listadepil – Tænastudepil**

Skúlin ynskir at leggja høvuðsdentin á náttúruvísindi, tónleik, handverk og list. Umframt tey vanligu fakhølini, sum vit kenna, verða onnur hølir, sum eru við til at seta vísindini, listina og vitanina á breddan.

**Náttúruvísindadepilin viðmerkingar:**

"Ny naturfag" www.nynaturfag.dk er íblástur at innrætta náttúrulærugreinarnar á ein nýggjan og kveikjandi hátt, har dentur er lagdur á læring.

**Listadepilin viðmerkingar:**

Umframt vanligu tónleikastovurnar eru venjingarhøli til einstaklingafrálæru í ymsum ljóðførum. Venjingarhølini skulu eisini brúkast til annað, tá tey ikki eru í nýtslu, eitt nú bólkarúm, ráðlegging og fundir. Drama er partur av listadeplinum. Dramarúmið er fyrst og fremst eitt venjingarhøli, men eisini eitt rúm, har tað ber til at hava minni framførslur fyri floksfeløgunum.

**Tænastudepil viðmerkingar:**
Tænastudepilin er staðið til hugdýping og rannsakan í vitan. Tænastudepilin skal vera kveikjandi og eggja næmingum at ganga nýggjar leiðir.

### 2.15 Starvsfólkafyrireiking og starvsfólkarúm

Skúlin er skipaður í trimum deildum. Fyrireikingarrúm og starvsfólkarúm eru á øllum deildunum til tey, sum starvast har. Starvsfólkini eru, har næmingarnir eru. Tað er eisini umráðandi, at starvsfólkini hava møguleika at møta starvsfeløgum frá hinum deildunum bæði í fakligum og sosialum høpi. Tí er harumframt eitt felags starvsfólkarúm fyri øll starvsfólk á skúlanum, hetta rúm hevur ein týdningarmiklan leiklut í at skapa trivnað og felagskenslu.

### 2.16 4-10

Sertilboðið 4-10 (serflokkar 4.-10. flokk) er ikki partur av nýggja bygninginum. Men um støða seinni verður tikin til, at tilboðið bygnaðarliga skal hoyra til tann skúlan, er helst møguleiki at gera pláss til tað í bygninginum.

Í løtuni húsast tilboðið í eindini við Landavegin hjá Skúlanum á Fløtum og brúkar serhølir í eindum hjá Skúlanum á Fløtum og annars hentleikar kring um í býnum. Tilboðið hoyrir rakstrarliga til Skúlan á Fløtum og námsfakliga undir Sernámi.

Pláss verður fyri 4-10 sertilboðnum í øðrum skúlabygningi í býnum.

Skúlabygnaðurin í Tórshavnar kommunu verður viðgjørdur aftur í heyst, og verður væntandi nærri greiða tí viðv. tíðiliga í 2016, og í tí sambandinum verður arbeitt við varandi skipanarligari staðseting av 4.-10 sertilboðnum, og tilmæli verður gjørt tí viðvíkjandi.

### 2.17 Fótbóltsskúli

Nakrir næmingar í 8. og 9. flokki ganga í fótbólts-skúla. Fótbóltsskúlin heldur til í Skúlanum á Fløtum, har flokkarnir hava sína floksstovu, og annars venja flokkarnir á almennu fótbóltsvøllunum.

### 2.18 Matarumstøður

Skúlin skal hava kantinu, har næmingar kunnu keypa sær okkurt til matna. Kantinan skal hava framleiðslukøk, sum ger matin. Matarsalurin, ella har næmingarnir eta, skal vera partur av felagshøllini.

### 2.19 Barnatannrøkt

Skúlin hevur ikki viðgerðarhøli, men bustirúm til 6 næmingar.

### 2.20 Stødd á skúlanum

Við grundarlagi í støddini á Skúlanum á Argjahamri og Skúlanum við Løgmannabreyt, umframt øðrum líknandi skúlum í Danmark verður

mett, at Skúlin á Fløtum verður 11.600 m2, svarandi til 13,5 m2 til hvønn næming.

### 2.21 Útbyggingarmøguleikar

Tað skal bera til at útbyggja hádeildina við tveimum flokshølum, soleiðis at 7. flokkur við tíðini kann vaksa til at verða 5 sporaður.

### 2.22 Byggistig

Byggingin skal skipast sum ein bygging í trimum byggistigum, har byggistigini verða tikin í nýtslu, so hvørt sum tey eru liðug.

Byggingin skal leggjast soleiðis til rættis, at tað ber til at taka byggingina stigvíst í nýtslu. Hetta setur stór krøv til tilrættalegging av byggingini, soleiðis at skúlin ikki verður darvaður, meðan byggingin fer fram, og at trygdin hjá næmingum og starvsfólkum ikki er í vanda.

Nærri lýsing av byggistigunum í parti 2, námsfrøðilig viðurskiftir.

## 3. Tíðarætlan

### 3.1 Tíðarætlan

| | |
|---|---|
| Okt. 2015 | Undangóðkenning av toymum |
| Okt.-des. 2015 | Huskotskapping |
| Jan. 2016 | Sáttmálasamráðingar |
| Jan.-apr. 2016 | Skipanaruppskot |
| Apr.-mai 2016 | Arbeiðstakarasáttmáli |
| Jun.-nov 2016 | Projektering 1. Byggistig |
| Aug. 2016-feb 2017 | Jørðarbeiði |
| Nov. 2016-feb. 2017 | Útbjóðing, tilboð, samráðingar |
| Feb. 2017-juli 2018 | Bygging 1. Byggistig |
| Feb.-juni 2017 | Projektering 2. Byggistig |
| Juli-sep. 2017 | Útbjóðing, tilboð, samráðingar |
| Sep. 2017-juni 2019 | Bygging 2. Byggistig |
| Sep. 2017-feb 2018 | Projektering 3. Byggistig |
| Feb.-apr. 2018 | Útbjóðing, tilboð, samráðingar |
| Apr. 2018-juni 2020 | Bygging 3. Byggistig |

### 3.2 Kostnaðarkarmur

Bygginevndin metir byggiútreiðslur og ráðgeving til kr 350 mió. íroknað innrætting av útiøkjum, útreiðslur til fast og leyst innbúgv, aktiva útgerð s.s. teldur, samvirkistalvur o.l. íroknað MVG.

### 3.3 Útbjóðing av byggiarbeiði

Bygginevndin mælir til at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku og samstarva í partalagi.